# Lestrarkunning í Miðlahúsinum

**Í gjár var pisudagur fyri fólk, sum eru komin inn til hægri lestur uttanlanda.**
**– Tað vóru ikki so nógv fólk møtt upp, sum tað hava verið onkuntíð fyrr, men vit høvdu nøkur góð upplegg. Aftaná høvdu vit bólkaarbeiði, og eg haldi, at tað var sera gott fyri tey uppmøttu at møta øðrum, sum fara at lesa, sigur Holger Arnbjerg frá ASK**

PISUDAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Um 20-30 fólk vóru savnaði til lestrarkunning í Miðlahúsinum í gjár*

*Mynd: Niels Uni Dam*

ASK (Altjóða Skrivstovan) og MFS (Meginfelag Føroyska Studenta) skipaðu í gjár fyri einum pisudegi fyri fólk, sum hava fingið játtandi svar um hægri lestur uttanlanda. Umleið 20-30 fólk vóru møtt til tiltakið, og tað er minni enn tað hevur verið onkuntíð fyrr. Holger Arnbjerg, dagligur leiðari á ASK, er tó væl nøgdur við tiltakið:

– Tað byrjaði við uppleggum frá MFS, Sparikassanum og øðrum. Eg haldi, at skráin var góð og eitt sindur øðrvísi. Spaikassin gav eina metan um, hvussu tú best kanst skipa teg fíggjarliga, tá ið tú fert at lesa, sigur Holger

Luttakararnir savnaðust í bólkum alt eftir, hvar tey fóru at lesa. Tey tosaðu saman í ein tíma.

– Tað er gott at hitta fólk, sum fara at lesa á sama stað sum tú. Tað hjálpir kanska til at gera lestrarbyrjanina lættari.

– Vit fingu svarað nøkrum spurningum, sum luttakararnir sótu inni við, t.d. um flyting, skatt, arbeiði eftir útbúgving og annað, sigur Holger.

### Vil fegin ráðgeva

Holger Arnbjerg starvast hjá ASK, og hann vil fegin ráðgeva føroyingum um útbúgving uttanlanda.

- Eg ráðgevi um útbúgvingar uttanlanda. Vit royna eisini at kunna um lestrarmøguleikar uttan fyri Danmark. Tað ber til at ringja til mín ella e-meyla. Ella kanst tú fara inn á heimasíðuna www.ask.fo.

– Tað eru summi, sum ivast í, hvat land er best at fara til fakliga ella fíggjarliga. Fólk kunnu venda sær til mín, og eg skal fegin ráðgeva, sigur Holger.

Tað er vorðið meira vanligt, at fólk fara longur enn til Danmarkar at lesa. Stórabretland er vorðið vælumtókt, og samært Holger er tað einans ein styrki fyri Føroyar.

– Tað er gott, um vit fáa eitt fjølbroytni í samfelagnum. Fólk fáa ymiskar framferðarhættir til trupulleikar alt eftir, hvar tey hava lisið, og tað er bara gott.

Í september byrjar tiltakið »Markleys útbúgving«, sum ASK skipar fyri. Tað er kunning um lestrarmøguleikar í fleiri londum.

– Vit arbeiða miðvíst við at fáa føroyingar út at lesa, og vit vilja fegin hava fólk til meira forkunnug lond enn Danmark. Stuðulsstovnurin hevur eina stuðulsskipan, sum skal neutralisera munin á kostnaðinum millum londini. Um tað t.d. er dýrari at lesa í Onglandi enn í Danmark, so fært tú meira stuðul. Soleiðis skal tað ikki vera fíggjarligir trupulleikar, sum forða fólkum í at fara longur út at lesa, sigur Holger Arnbjerg at enda.

## Lestrar-skuldin veksur

Danir, sum taka útbúgving á lærdum háskúlum, hava nógv størri lestrarskuld at dragast við nú enn fyrr.

Eftir fimm árum er talið á akademikarum, sum hava størri lestrarskuld enn 100.000 krónur, vaksið heili 55 prosent.

Jakob Lange hjá SU-ráðnum sigur, at støðan er vorðin sum í áttatiárunum, uttan at nakar hevur givið sær far um tað. Tá noyddist staturin at strika nógva lestrarskuld, og soleiðis verður helst eisini nú.

Tað eru eisini tey, sum hava heilt stóra lestrarskuld at dragast við. Fyri fimm árum síðani vóru tað 200, sum skyldaðu meiri enn 250.000 krónur. Í dag eru tey umleið 700 í tali.

**-fartekst**

## Oljan dýrkar

Prísurin á amerikanskari ráolju kvinkaði aftur upp eftir mánamorgunin. Hetta hendir eftir at BP hevur givið boð um, at tey fyribils steingja størsta amerikanska oljufeltið, tí ein rørleiðing í hesum hevur fingið skaða. Oljufelatið í Proudhoe Bay í Alaska stendur fyri á leið 8% av samlaðu amerikonsku oljuframleiðsluni, og tí er hetta ein dyggur smeitur fyri longu hart kroysta marknaðin. Prísurin á oljuni er nú 76 dollarar fyri tunnuna. Metið er 78 dollarar fyri tunnuna, sigur Reuters í dag.

**-mørk**

# Ísraelstoymið kom aftur í øllum góðum

Fríggjadagin kom Ísraelstoymið hjá Heimamissiónini heim aftur í øllum góðum. Tey fingu ein rættiligan hvøkk, tá ið kríggj brast á dagin eftir, at tey vóru komin til Ísrael.

Føroyingarnir vóru nakrar ferðir niðri í bumbuskýli, men tað var ikki ordiliga vandi á ferð.

Føroyingarnir hildu til á Karmel-fjallinum, sum er tætt við Haifa. Økið við Karmel-fjallið hevur ikki verið útsett fyri nakað álop. Lítil ivi er um, at foreldrini eru glað um at hava fingið tey heim aftur.

Hóast vandan hevur toymið havt legur fyri børnunum í Ísrael eins og upprunaliga ætlanin var, so ferðin var ikki spilt av álopunum.

**- HeiniK**

# David Phelps fór beinleiðis til flogfarið

David Phelps framførdi sína seinkaðu konsert seinnapartin í gjár. Tað vóru nógv fólk komin til konsertina, og Phelps hevði gott samband við føroyingarnar.

Eftir konsertina tók Phelps sær tíð til at skriva autografar til fjepparanar í teltinum. Tað var stúgvandi fult av fólki, sum fegin vildu sleppa at heilsa uppá fryntliga mannin við tí flottu røddini.

Eftir nakrar minuttir kom samskiparin yvir til David og segði honum, at teir máttu fara. Tað var eyðsýnt, at Phelps hevði fegin viljað nýtt meira tíð til sínar fjeppara, men hann mátti fara beinleiðis til flogvøllin, tí at hann skuldi flúgva longu klokkan 18.45.

Ætlanin var, at David skuldi fáa tíð til at fiska í Føroyum, men orsakað av, at flogfarið ikki lendi til tíðina, varð tað av ongum.

**- HeiniK**


Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum

